# Ódnarveður kravt 124 mannalív

Ódnin Ida, sum herjaði miðamerikanska landið El Salvador um vikuskiftið, hevur kravt minst 124 mannalív. 60 onnur eru ikki komin afturíaftur. Tað segði landsins forseti við eina útvarpsstøð í morgun. Hann segði eisini, at nógv hús eru so illa farin, at umleið 7.000 fólk noyðast at vera í tjaldlegum, sum myndugleikarnir hava sett upp. Tað nógva regnið, sum ódnin hevði við sær, elvdi til vatnflóð og skriðulop, og sum skilst eru tað serliga skriðulopini, sum hava kravt mannalív. Ida hevur eisini gjørt stóran skaða í grannalandinum Nicaragua.



# Kina mennir Afrika

Kina fer at læna londum í Afrika 10 milliardir dollarar til ymisk menningarátøk. Tað kunngjørdi kinesiski forsætisráðharrin, Wen Jiabao, tá hann í gjár helt røðu á tí serliga samstarvsfelagsskapinum, sum umsitur samstarv og handil millum Kina og Afrika. Fyri trimum árum síðani lænti Kina londum í Afrika fimm milliardir dollarar, og harumframt hevur kinesiska stjórnin gjørt sáttmála við 31 lond í Afrika um at avskriva part av tí, sum tey skylda kinesiska ríkiskassanum. Kina hevur víst stóran áhuga fyri Afrika tey seinastu árini, og hesi árini hava kinesiskar fyritøkur gjørt stórar íløgur í eitt nú oljuvinnu í afrikonskum londum, skrivar Reuters.



*Borgarstjórarnir í teimum báðum størstu kommununum í Suðuroy, Kristin Michelsen og Kirstin Strøm Bech, eru púra samd um, at verður toppurin ikki saneraður av kommunuskuldini, er tað púra endamálsleyst at tosa um at kommunusamanlegging í Suðuroy*

# Sanering ein fortreyt fyri samanlegging í Suðuroy

**Borgarstjórin í Vági og á Tvøroyri eru samdir um, at skal nøkur meining vera í at leggja kommunurnar í Suðuroy saman, má toppurin skerast av kommunuskuldini**

SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Skal nakað endamál verða við at leggja Suðuroynna saman í eina kommunu, má toppurin takast av kommunuskuldini.

Tað eru Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági og Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri púra samd um.

– Verður toppurin ikki skorin av kommunuskuldini, kann tað gera tað sama at leggja saman tí hevur tann samanlagda kommunan onki rásarrúm yvirhøvur og fær ikki virka, siga teir báðir borgarstjórarnir.

### Onki endamál

Borgarstjórin í Vági var leingi ímóti at leggja alla Suðuroy í eina kommunu. Men beint upp undir seinasta kommunuval, tók hon øll á bóli, tá ið hon brádliga kunngjørdi, at hon hevði broytt hugsan og at hon nú helt, at tað einasta rætta er at savna alla Suðuroy í eina kommunu.

– Men eg eri komin eftir, at skuldin hjá Vági og Tvøroyri er so stór, at verður toppurin ikki skorin av skuldini, tænir tað ongum endamáli at leggja saman, sigur hon nú við Sosialin.

– Tað er onki endamál í at leggja saman bara fyri at leggja saman. Hava vit onki fíggjarligt rásarrúm, fáa vit ikki virka og so er onki at leggja saman til.

### Frættu onki aftur

Kristin Michelsen er samdur og hann vísir til, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur fleiri ferðir nevnt, at leggja kommunur saman, er hann opin fyri at viðgera spurningin um at skera toppin av kommunuskuldini fyri at geva samanløgdu kommununi eitt fíggjarligt rásarrúm at virka í.

– Borgarstjórarnir í Suðuroy hava fyri langari tíð síðani biðið Jóannes Eidesgaard um fund um hetta málið, men enn hevur hann ikki latið frætta frá sær, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.

Annars heldur borgarstjórin á Tvøroyri, at nógvar pílar fyri Suðuroy vísa skeiva vegin í løtuni.

– Fólkatalið minkar alsamt og barnatalið minkar alsamt. Á flakavirkinum í Vági hevur verið at kalla øskukalt í langa tíð og á øðrum fiskavirkjum hevur eisini verið avmarkað arbeiði. Og samstundis sum landspolitikarar sjálvir hava ført ferðavinnuna fram sum eina sjálvsagda vinnu at menna í Suðuroy, ætla teir at skerja ferðaætlanina hjá Smyrli, so at umstøðurnar at ferðast til og úr Suðuroy og at reka ferðavinnu, versnar munandi.

Í hesum sambandi kann eisini vísast á, at í ár byrjaðu tilsamans 61 børn í fyrsta flokki í Suðuroy. Ein framskriving hjá mentamálaráðnum vísir, at longu í 2015, verða tað ikki fleiri enn 41 børn, sum byrja í fyrsta flokki í Suðuroy, ella heili 20 færri.

Hetta ger Suðuroy til tað økið í landinum, har barnatalið minkar nógv mest tey næstu árini.

– Tí er tað altavgerandi at fáa ung húski at flyta í oynna, men ein fortreyt fyri tí er, at størv og onnur tilboð eru til tey, men tað hava kommunurnar ógvuliga avmarkaðar, fyri ikki at siga púra ongar, møguleikar til, sum fíggjarliga støðan er nú.

Annars eru fíggjarætlanirnar hjá kommununum fyri næsta ár ikki lagdar enn, men tað lýsir væl fíggjarligu støðuna, sum kommunurnar eru í, at Hvørki Vágur, Tvøroyri ella Hvalba, hava at kalla eina krónu til íløgur næsta ár, fortelja borgarstjórarnir fyri Sosialinum.

– Tí er tað neyðugt at fáa toppin av kommunuskuldini, so at ein samanløgd kommuna kann fara undir verulig tiltøk, sum kunnu menna oynna í eini roynd at fáa fólk at flyta aftur, ikki minst fólk við útbúgving, sigur Kirstin Strøm Bech.

## Ongar íløgur í Vági

Tað verða at kalla ongar íløgur í Vágs Kommunu næsta ár.

Tað er greitt, nú Vágs Býráð á fundi mikukvøldið hevði fíggjarætlanina fyri næsta ár til viðgerðar fyri fyrstu ferð.

Fíggjarætlanin skal til viðgerðar í býráðnum aftur, áðrenn hon verður samtykt.

Men hóast broytingar kunnu væntast, er tað kortini rættiliga greitt, at karmarnir liggja fastir og tær broytingar, sum so verða gjørdar, verða innan fyri teir.

Og karmarnir eru teir, at næsta ár verður skattaprosentið og barnafrádrátturin tann sami sum í ár, ella ávíkavist 23,25% í skatti og 4000 krónur í barnafrádrátti.

Sostatt verður skattainntøkan næsta ár mett til 34,5 milliónir og tað er ein góð hálv millión meiri enn inntøkan væntandi fer at vera í ár.

Hinvegin hava sparingar og flytingar gjørt, at næsta ár verður raksturin 26,2 milliónir næsta ár og tað er hálvonnur millión minni enn í ár.

Hetta kemst av, at keyp verður minkað, fólk eru farin úr starvi, ella farin niður í starvstíð og aðrar flytingar.

Tá ið lánsgjøld eru goldin er greitt, at lítið og onki er eftir til íløgur.

Tað er eitt talandi dømi um fíggjarstandin hjá Vágs kommunu, at størsta einstaka íløgan, sum ætlanin er at gera í Vági næsta ár, er, at 300.000 krónur skulu brúkast til sitipláss við fótbóltsvøllin, so at vøllurin kann verða góðkendur til dyst í Vodafonedeildini, har VB/Sumba skal spæla á, men tað verður undir navninum FC Suðuroy.

Men ljóspunktið er so, at nú er skuldin hjá Vágs Kommunu komin beint niður um eina álíkning.

Eisini í tveimum øðrum av teimum størru kommununum í Hvalba og á Tvøroyri, er tað longu nú greitt, at tað verður at kalla øskukalt við íløgum næsta ár.